Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Reist mál ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við at grind er hildin til

Spurningar:

1. Metir landsstýriskvinnan, at tað er heimild í lógini um djóravælferð at reisa mál ímóti sýslumonnum og grindaformonnum í sambandi við at halda grind til?
2. Kann landsstýriskvinnan vátta, at alt, sum snýr seg um grindadráp og aðra veiðu av villini djórum í okkara egna náttúrutilfeingi, er skipað í serstakari føroyskari lóg og reglum, sum ikki kunnu setast til viks av aðrari lóg?
3. Hvat ætlar landsstýriskvinnan at gera til tess at tryggja, at útlendskir felagsskapir ikki umvegis ákæruvaldið og løgregluna í Føroyum kunnu reisa mál um avgerðir og fyriskipanir, sum eru heimilað í grindalógini?

Viðmerkingar:
Tað er nú váttað, at skuldsetingar eru reistar ímóti sýslumanni og grindaformonnum í Føroyum í sambandi við kærur frá útlendskum felagsskapum, ið vilja steðga grindadrápi í Føroyum.

Tí verður spurt, hvat landsstýrið veit um og ger við hetta mál, soleiðis, at tað er grindalóggávan í Føroyum, sum framhaldandi er grundarlagið fyri allari regulering av tí, ið hevur við grindarakstur, at halda grind til og at býta grind í Føroyum at gera.

Á Løgtingi, 24. november 2025

Høgni Hoydal